# – Alfred lovað at atkvøða við samgonguni

**Kaj Leo Johannesen sigur, at hann hevur tosað við Alfred Olsen, ið hevur lovað honum at atkvøða við samgonguni. Formaður Sambandsfloksins, at hetta kann tykjast undarligt, men um Alfred Olsn skal viðgerast í samgonguni, so skulu aðrir samgongulimir eisini**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Formaðurin viðgongur, at talan er um eina undarliga støðu*

Eftir at ein meiriluti í Løgtinginum atkvøddi fyri at broyta § 266b í revsilógini, so at hon eisini kom at umfata kynsliga sannføring, skapti hetta ikki so lítið av rumbli í føroyskum politikki. Karsten Hansen tók seg úr Tjóðveldisflokkinum og Alfred Olsen í Sambandsflokkinum meldaði út, at hann ikki longur var partur av samgonguni.

Kortini frættist nú, at hann stuðlar somu samgongu.

Eins og Kristian Magnussen, formaður í tingbólki Javnaðarfloksins segði millum jólanna, so tykist ikki, sum Alfred Olsen hevur meldað seg upp í andstøðuna, hóast hann hevur tikið seg úr samgonguni.

Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, sigur við Sosialin, at hann hevur tosað við Alfred Olsen, og at hann hevur lovað at atkvøða við flokkinum og samgonguni.

*Men er hann so farin úr samgonguni?*

- Ja, tað er ein góður spurningur Theodor, men tá hann sigur, hann vil stemma fyri, so taki eg tað fyri góðar vørur, sigur Kaj Leo Johannesen, ið viðgongur, at hetta kann kallast ein "undarlig støða", sum hann tekur til.

- Men eg havi fingið trygd fyri hesum, og tað eri eg nøgdur við.

- Hetta hevur ongan praktiskan týdning, sigur formaður Sambandsfloksins, ið heldur, at samgongan er intakt.

## Rótut samgongu-samskifti

Kaj Leo Johannesen heldur, at tað sum serliga er týdningarmikið við at hava eina breiða samgongu, er at fólk kunnu atkvøða ímóti, og ger vart við, at Alfred Olsen atkvøddi fyri fíggjarlógini í mun til aðrar samgongulimir, sum atkvøddu fyri pørtum av fíggjarlógini.

*Men er Alfred Olsen so formelt í samgonguni, men ikki reelt?*

- Eg havi tryggjað mær, at hann stemmar við flokkinum og samgonguni. Tað er altíð gott at hava ein mann sum Alfred við. Hann er eitt arbeiðsgrev, sigur Kaj Leo Johannesen.

Jóannes Eidesgaard segði herfyri við Sosialin, at hann ynskti ein fund í lítlu samgongu um málið. Men um so verður, so fer Kaj Leo Johannesen eisini at krevja, at aðrir samgongulimir verða viðgjørdir.

- Samgongusamskiftið hevur ikki verið nøktandi, tað hevur verið rótut seinastu tríggjar mánaðirnar, har samgongulimir hava verið eftir hvørjum øðrum, sigur Kaj Leo Johannesen, ið heldur, at løgmaður hevur høvuðsábyrgdina av hesum. Men hann avvísir ikki, at slíkt er vanligt hjá politikarum, tá val nærkast.

Í vikuni stóð eitt eitt lesarabræv hjá Stefan í Skorini í bløðunum, har hann kallar støðuna hjá Alfred Olsen "ta ultimativu andsøgnina". Spurdur, um Kaj Leo Johannesen hevur nakra viðmerking til hesa útsøgn, sigur hann, at tað hevur hann ikki.

- Mín høvuðsábyrgd er at hava ein stóran og intaktan flokk, sigur floksformaðurin.

## Moralsk ás ikki tabu

Í seinastuni hevur tosað um, ein ás løgd afturat føroyskum politikki, tvs. at umframt ásirnar ið snúgva seg um høgra-vinstra og loysing-samband, so skal ein sokallað moralsk-etisk ás verða komin afturat, har teir sonevndu etisku spurningarnir eru avgerandi.

Kaj Leo Johannesen sigur, at tey ikki hava viðgjørt hetta í flokkinum, men sigur at hetta kanska verður tikið upp á næsta landsfundi, tí einki skal vera tabu í flokkinum.

- Men nú skilji eg betur, hví ta ikkier tikið upp, tí tað skapar nógv djúp sár, sigur Kaj Leo Johannesen, tá hann verður spurdur, um flokkurin skal hava eina felags tøðu til hesi mál.

- Tað eru ov nógv mál, sum kloyva okkum, og tað er ikki orka til tað í longdini, um vit skulu menna okkum, sigur Kaj Leo Johannesen.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Alfred Olsen, áðrenn blaðið varð prentað.

# Løgmaður skilir framvegis ikki Alfred

**- Í politisku skipanini kann eingin sæta sær sjálvum, sigur Jóannes Eidesgaard, og tí er ætlanin at hava fund í samgonguni, sigur Jóannes Eidesgaard um málið um Alfred Olsen**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*

Jóannes Eidesgaard. løgmaður og samgonguleiðari, sigur at hann hevur tosað við Kaj Leo Johannesen um støðuna hjá Alfred Olsen. Hann kallar hetta ein trupulleika fyri samgonguna og at hetta kann vera trupult at skilja.

- Nú manglar bara, at hann sigur, at hann er í samgonguni, sigur Jóannes Eidesgaard um Alfred Olsen.

Løgmaður heldur, at hóast Alfred Olsen reelt ikki er farin úr samgonguni, so er hon viknað.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at positiónin sum formaður í Rættarnevndini, ið Alfred Olsen hevur í løtuni, er høgt í metum, og at hesa hevur Sambandsflokkurin fingið frá samgonguni, og Sambandsflokkurin hevur givið hana víðari til Alfred Olsen.

- Í politisku skipanini kann eingin sæta sær sjálvum, sigur Jóannes Eidesgaard, og tí er ætlanin at hava fund í samgonguni innan tingfundin 23. januar.

- Men kanska vit ein fund áðrenn, og tá er natúrligt at umrøða hetta.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann sum samgonguleiðari ikki kann ignorera, at Alfred Olsen hevur sagt seg úr samgonguni, og at hann tí vil fáa hann inn aftur í hitan, sum hann málber seg.

## Flokshugsjónin kann detta burtur

Spurdur, um tað er neyðugt í føroyskum politikki, at flokkarnir melda út, hvat teir standa á tí moralsku ásini í føroyskum politikki.

- Eg dugi at skilja trupulleikan, men tað verður trupult, tí so dettur flokshugsjónin burtur, sigur løgmaður.

Hann sigur, at neyvar floksmeldingar kunnu vera neyðugar, men at neyðugt er eisini við tolsemi innanfloks, so limirnir standa frítt í sokallaðum etiskum málum.

- Men vit skylda veljarunum at siga, hvar flokkurin alment stendur offisielt, sigur Jóannes Eidesgaard, og leggur afturat, at so kunnu ávísir limir í flokkinum hava eina aðra støðu.

- Hyggur man sosialdemokratiskt, var tað mín linja, flokkurin meldaði út. Men vit hava eisini virt hinar, sum ikki meintu hetta, og tað er eisini sosialdemokratiskt, sigur Jóannes Eidesgaard.

Meira um evnið á síðu 20